## Brell fluttur

Handilin Brell, sum higartil hevur verið í Bringsnagøtu Havn, er nú fluttur í Dr. Jacobsensgøtu, har hann heldur til í gomlu hølunum hjá Bixini, sum eru beint yvir av Keypssamtøkuni. Eigararnir siga, at nýggja staðið er væl egnað til handilin. Samstundis hevur Brell lagt á annan bógv og hevur nú spesialiserað seg í kaffi, te og konfekt og tí, sum hoyrir til. Harumframt hevur handil stempulkannur, mokkakannur, te-egg og annað.

## Limafundur

Felagið fyri Hoyribrekað í Føroyum heldur limafund í Havn sunnudagin 26. november. Fundurin verður í MBF-húsinum við Íslandsvegin og byrjar klokkan 15. Har fer Bjarki Ellefsen, oyrnalækni, at tosa um deyva-screening av nýføddum børnum, og tá hann er liðugur, verður hugnaløta við sangi og øðrum á skránni. Samstundis fáa áhugað høvi at tekna seg sum limir í Felagnum fyri Hoyribrekað í Føroyum.

# Løgreglan ikki sitið hendur í favn

**Vikuskiftið hevur ikki verið av teimum strævnastu, men løgreglan hevur ikki sitið hendur í favn, og hava teir tykist við eitt sindur av hvørjum**

LØGREGLUTÍÐINDI
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Frágreiðingin um vikuskiftið hjá løgregluni fyllir 16 síður. Ikki hava verið stórmál á skránni, men eitt sindur av hvørjum hava teir havt at gjørt.

Kavin og kuldin hevði við sær, at fleiri bilar fóru útav í hálkuni. Ongin álvarsskaði stóðst av nøkrum av hesum, men í eina førinum var løgreglan noydd at fara víðari við málinum, tí at ein maður helst hevði fingið dekan ov nógv niður um av tí sterka slagnum, so har varð blóðroynd tikin og so koyrir málið víðari.

Í Trongisvági fór eisini ein bilur útav í hálkuni. Bilurin var fullur av ungdómun, men hóast tað sá ógvusligt út og lætt kundi endað sera álvarsamt, so spældi alt væl av og talan var bara um materiellan skaða.

### Tríggir knústir rútar

Sjáldan fer eitt vikuskifti framvið uttan herverk, og í so máta var farna vikuskiftið onki undantak. Tríggjar fráboðanir fekk løgreglan í Havn um herverk, og í øllum trimum førunum var talan um knústar rútar hjá handlum í býnum. Telebúðin, Thomas Dam Ítrottur og Mótaskálin høvdu staðið fyri skotum, og úrslitið síggja tit á hesi síðu.

### Vildi hjálpa løgregluni

Í samband við knústa rútin í Telebúðini, so helt ein unglingi, at hann átti at geva løgregluni eina hjálpandi hond við uppkláringararbeiðinum. Hetta helt løgreglan ikki var so snilt, og bað mannin um at sleppa sær avstað. Tað vildi hann ikki, og so var løgreglan noydd at handtaka mannin. Hann verður nú skuldsettur fyri brot á politiviðtøkurnar.

Av øðrum tingum úr rapportini hjá løgregluni stendur, at uppi í Nonnuskúlanum hugnaðu nakrir ungdómar sær við at knúsa fløskur og larma øgiligt. Tá løgreglan kom á staði, tóku hesir beinini á nakkan og so hendi ikki meiri enn tað sama.

Løgreglan var eisini úti, og biði fólk um at dempa tónleikin, tí grannarnir ikki fingu svøvnfrið. Og sum tað síðsta hevur løgreglan eisini koyrt full fólk heim úr býnum.

Tað er í høvuðsheitum tað, sum løgreglan hevur tykist við um vikuskiftið.



*Hóast tað sá ógvusligt út og lætt kundi endað sera álvarsamt, so spældi alt væl av og talan var bara um materiellan skaða, tá hesin bilurin fór útav í Trongisvági leygardagin*

*Mynd: Áki Bertholdsen*









*Hetta er úrslitið av, at onkur um vikuskiftið hevur stytt sær stundir við at bróta rútar í miðbýnum í Havn*

*Myndir: Rólant Waag Dam*